


# Mikkjal í Dali: Havnarmaðurin sum fiskaði porkerningar av

**Vit hava í hesi røð umrøtt Christian og Ludvig í Dali, sum liggja í gamla kirkjugarði, Hesa ferð umrøða vit beiggja teirra Mikkjal og konu hansara Ellen Elisabeth**

Óli Jacobsen

Foreldrini hjá Mikkjali vóru Christian Michael Jacobsen (1823-1886, giftur í Havnar Kirkju 4. september 1845 við Onnu Lydersdatter (1820-1910) av Toftum.

Michel var føddur 17.12 1849, og hann giftist við Ellen Elisabeth Jacobsen f. 4.9 1843. Hon var ættað av Húsum í Havn, dóttir Joen Jacobsen (1804-1874), sum tann 6.1. 1842 giftist við Onnu Christinu Jacobsdatter (1815-1882), ættað úr Kaldbak.

Tað sigst í ættini, at Jógvan er den "den Havnemand," sum er høvuðspersónurin í grindavísuni hjá Pløyen.

Mikkjal sjálvur var útróðrar- og traðarmaður, sum var tað mest vanliga í Havn fyrr í tíðini. Sum útróðrarmaður hevur hann verið nakað serligt. Ein sonur, Christian, flutti til Porkeris. Ein sonur hansara, tann 93 ára gamli Poul, minnist abban koma til Porkeris at ferðast. Tá plagdi hann eisini at rógva út. Tað var skjótt, at hann kom eftir fiskimiðunum hjá porkerningum, og tá fekk hann nógv meira fisk enn porkerningar sjálvir. Hetta kundu teir als ikki skilja og hildu, at tað mundi vera okkurt við agninum. Gitt varð, at hann nýtti rottur! Men sannleikin var, at hann nýtti krækling.

Kona Mikkjal doyði ung. Í tí sambandinum hevur hann eisini verið nakað serligur. Hann setti konuni ein vakran steinin við ikki minni vakrari innskrift. Tað hevur ikki verið vanligt hjá traðar- og útróðrarmonnum fyri meira enn 100 árum síðani.

Tey búðu í Trappugøtu, sum gongur oman á Vágsbotn, har Mikkjal eisini hevði neyst. Hann hevði trøð, har Kardumummubýurin er.

**Ellen og Mikkjal** fingu børnini:

***Jógvan Christiansen***, føddur 8. oktober 1877. Hann giftist við Onnu Elisabeth f. Thomsen, eisini úr Havn

Zacharias Sørensen skriva m.a. í minningarorðum í Tingakrossi í mai 1941:

Hugur hansara var allar dagar til sjógvin. Sum smádrongur róði hann út við pápanum Mikkjali í Dali, og stutt eftir, at hann varð konfirmeraður, fór hann til skips og varð uppvandur hjá farbrøðrunum Jóhan og Christiani í Dali og Napoleon Andreassen. Í 1901 tók hann stýrimannaprógv á Fanø Skipaskúla og kom so heim aftur til Føroya og fekk beinanvegin skip at føra frá Napoleon Andreassen. Tá ið Thorshavns Mælkeforsyning í 1908 fekk sær egið strandfaraskip, og teir skuldu hava ein álitismann til skipara, varð boð sent eftir honum. Hann sigldi "Ruth" heim úr Noregi og førdi hann so, til hann bleiv lærari á skiparaskúlanum veturin 1917/1918. Síðan tá hevur hann hvønn vetur verið lærari, meðan hann um sumrini hevur róð út.



*HER HVILER EN TROFAST*
*HUSTRU OG MODER*
*ELLEN ELISABETH*
*CHRISTIANSEN*
*FØDT JACOBSEN*
*F. 4. SEPTEMBER 1843*
*D. 21. FEBRUAR 1902*

*ALTID I MEDGANG*
*SAGTMODIG DU VAR*
*MODGANGENS DAGE*
*TAALMODIG DU BAR*
*DERFOR HERREN I*
*HIMLEN DIG LØNNE*
*NU GLÆDES DU BLANDT*
*ENGLENE SKØNNE*
*...*
*MICHEL CHRISTIANSEN*
*F. 17. DECEMBER 1949*
*D. 14. FEBRUAR 1938*

Jógvan var kendur um alt Føroya land, tí teir 500 næmingar, hann hevur havt undir sínum hondum hesi 24 ár, minnast hann, ikki bert sum hin framúr góða lærara, men sum hitt góða fólkið hann var. Ivaleyst eru teir mangir í dag, sum takka honum fyri tey góðu ráð, hann gav teimum, eisini uttan fyri skúlastovuna.

Jógvan var álitismaður, og honum varð víst álit. Hann hevur í mong ár verið limur í Tórshavnar Meinigheitsráð og sitið í stýrinum fyri meinigheitshúsið. Hesi størv røktaði hann við sama trúskapi og kærleika, sum alt annað, honum varð lagt. Hann var ein trúgvur kirkjumaður og tók dúgliga lut í kristnum leikmannaarbeiði. Mest glaður var hann fyri arbeiðið millum børnini i sunnudagsskúlanum, tí barnavinur var hann.



*Elin saman við børnunum: Standandi Anna og Jógvan. Frammanfyri: Jacob Pauli, Elin situr undir tvíburunum Johan og Christinu Mariu, Cristian*



*Ljósa húsið høgrumegin er skóhandilin hjá Jóan Jakku. Aftanfyri handilin er neystið hjá Mikkjal. Beint aftanfyri neystið sæst skjøldurin á húsinum hjá Mikkjali. Mynd: Hervør Mohr*

Men fram um alt var hann heimamaður. Hann var konu og dóttir ein góður maður og pápi. Í teirra heimi kendi man seg altíð væl, og hugnaligur var Jógvan, tá ið hann millum vinir segði frá hendingum, serliga sjóferðum.

Hann var ein spakførur og eyðmjúkur maður, og tí tók hann ikki beinleiðis lut í politikki. Men eisini her var hann støðufastur, og heldur ikki bar hann seg undan, tá Framburðsfelagið í 1932 valdi hann inn í Býráðið. Eisini hetta starvið røkti hann við trúskapi og ídni.

Ein góður Havnarmaður er farin, gævi vit høvdu fleiri av sama slagi.

**Christian Michael** f. 1880 flutti til Porkeris, har hann bleiv keypmaður. Hann giftist við Lorentse Mortinu Veihe f. 1880.

Tey fingu børnini Ellen Elisabeth f. 1909, Johan Pauli Michael, f. 1911, Susanna Olivia Johanna f. 1913, Michael f. 1915, Poul Magnus f. 1917, Andrea Kristina, f. 1919, Jona f. 1921. Umframt var fosturbeiggin Bjarti Sumberg.

**Anna** (1882-1933) giftist til Hvalbiar við Poul Poulsen (1879-1961), sum var bátasmiður. Tey fingu børnini Joen Pauli f. 1914, Michael Pauli, f. 1916, Eli Christian f. 1918.

**Jacob Pauli** f. 1885, skipari. Hann giftist við Johonnu Sofíu Michelsen, f. 1881, úr Vági. Tey fingu børnini: Jón Eskild Michael Bernhard f. 1909, Dania Helena f. 1912, Pauli f. 1916

**Christina Maria** (1889-1891), tvíburasystir Johan

**Johan Sofus** (1889-1928), skipari, giftist við Honnu Jacobinu Johansen (1894-1982) úr Sørvági

Johan var vanliga kallaður Hannemann. Hann var við á eini heilt serligari ferð í 1912. Tað var pápabeiggi hansara Christian Christiansen, vanliga kallaður loðsurin, sum við sínum seks tons motorbáti Louisa fór allan tann langa teinin úr Havn til Keypmannahavnar á eina fiskarímessu. Teir vóru fýra mans við, og ein teirra var Johan.

Í einum illveðri stóð hann til róðurs, meðan Christian stóð bundin til mastrina. Eina ferð Christian vendi sær á, er Johan farin fyri borð! Tíbetur var endi á honum, so hann varð bjargaður.



*Passmynd av Jógvani*



*Johan, Hannemann, fekk eina váta grøv.*



*Christian flutti til Porkeris. Tá ið pápin, Mikkjal, kom suður at rógva út vant hann burtur úr porkerningum!*

Johan tók skiparaprógv í 1908.

Í 1929 var Johan við fransaskonnartini Martu, sum var eitt stórt skip. Tað tók eini 1800-2000 skippund. Í oktober fara teir niður at landa fiskin, sum teir høvdu fingið undir Grønlandi. Tað kom av ringasta illveðri á teir, og skipið fór at leka. Teir royndu at halda lens men ikki bar til. Komnir fram við Fair Isle í Hetlandi sakk Marta. Fimm mans vórðu bjargaðir av enskum trolara, men tveir mans doyðu. Teir vóru kokkurin og Johan. Eftir sat konan Hanna við seks børnum.

Tey vóru:

Eli f. 1915, Jens Kristian, Kissa, f. 1916, Ingrid f. 1918, Borghild f. 1921, Herman f. 1922 og Michel f. 1925.

**Komandi partur**

Í komandi parti fara vit at umrøða gravsteinin hjá Enok Andreasen, á Frælsinum, kendur sum postmaður.